# Blind í Føroyum einsamøll

**Blind og sjónveik eru meira einsamøll í Føroyum enn í Danmark. Tí er tað so trupult hjá teimum at góðtaka, at tey hava eitt brek. Hetta sigur Karin Marie Pedersen úr Danmark, sum hevur havt skeið á Blindastovninum hesa vikuna.**

MILDRIÐ JACOBSEN

20 blind og sjónveik úr øllum Føroyum hava í vikuni verið á skeiði, sum Karin Marie Pedersen úr Danmark hevur havt á Blindastovninum.

Karin Marie Pedersen er fødd blind, og hon er leiðari á Kursus og Feriecentret hjá Dansk Blindesamfund.

Á skeiðinum legði hon stóran dent á, at tey blindu og sjónveiku læra at góðtaka seg sjálvan.

– Hava blind og sjónveik ikki virðing fyri sær sjálvum, so kunnu tey heldur ikki rokna við, at onnur hava virðing fyri teimum, sigur Karin Marie Pedersen.

Hon sigur, at orsøkin til at blind og sjónveik í Føroyum ikki vilja góðtaka, at tey hava eitt brek, er, at tey eru so einsamøll.

– Í Danmark koma vit ofta saman, og tað er lættari at góðtaka, at ein er blindur, tá ein hoyrir um onnur blind, sum klára seg væl, sigur Karin Marie Pedersen.

Marita Nystrøm, sum er formaður í Blindafelagnum, er samd við Karin Marie Pedersen.

– Tað er ringt hjá okkum at góðtaka, at vit ikki klára tað sama sum tey, ið síggja. Vit fara til dømis ikki út við hvítum stavi ella armbindi, tí vit skammast, sigur Marita Nystrøm, sum hevur verið við á skeiðinum.

## Taka avgerðir sjálvi

Endamálið við skeiðinum var at fáa tey blindu og sjónveiku sjálvi at siga, hvussu tey kundu hugsa sær at brúkt Blindastovnin, og hvønn tørv tey annars hava í gerandisdegnum.

Á síðsta skeiðdegnum tóku tey so avgerð um, hvørjum málum, tey fara at arbeiða víðari við.

Tey blindu og sjónveiku skulu sjálvi seta í verk tiltøkini og broytingarnar, sum tey hava avgjørt at fremja.

Tað eru fleiri ung blind í Føroyum, og tey hava sett sær fyri, at Blindastovnurnin skal virka sum eitt arbeiðspláss hjá teimum.

– Tey vilja hava okkurt at fara upp til hvønn morgun. Tí er tað ikki nóg mikið at vera á Blindastovninum nakrar seinnapartar um vikuna, soleiðis sum skipanin er nú, sigur Marita Nystrøm, formaður í Blindafelagnum.

Luttakararnir á skeiðinum hava eisini sett sær fyri at fáa eina tænastu við innlesing setta á stovn.

Talan er um eina tænastu, har blind og sjónveik kunnu fáa alt, sum tey ynskja, lisið á band.

Fleiri hildu tað eisini vera neyðugt at gera nakað við umstøðurnar hjá sjónveikum í ferðsluni. Tey fara tí at gera sítt til, at vegirnir verða betur merktir við hvítum strikum.

## Ikki detta niðurfyri

Skeiðluttakararnir hava skipað seg í bólkar, sum fara at arbeiða við hvør sínum máli.

Eingin freist er ásett, nær hetta arbeiðið skal vera liðugt, men hvørki Karin Marie Pedersen ella Marita Nystrøm ivast í, at tað fer at eydnast teimum at seta í verk tiltøkini.

– Eg havi stóra virðing fyri teimum, sum eg havi hitt á hesum skeiðinum, og eg ivist onga løtu í, at tey fara at fremja tiltøkini, sum tey hava tikið avgerð um, sigur Karin Marie Pedersen.

Formaður í Blindafelagnum, Marita Nystrøm væntar eisini, at okkurt spyrst burturúr.

– Vit hava lært á skeiðinum, at vit skulu ongantíð geva upp, sigur Marita Nystrøm.



**Karin Marie Pedersen úr Danmark hevur havt skeið á Blindastovninum hesa vikuna**



**Hugnaløta var á Blindastovninum mikudagin, tá skeiðið fyri blind og sjónveik endað**

Køksmiðstøðin

Lágorku-frysti-boksir

CFC og FREON fríar

KONTANT TILBOÐ

100 ltr. L:55 D:60 H:85. Orku-nýtsla: 0,8 kWh. 2.595,-

200 ltr. / 182 ltr. netto. L:75 D:65 H:87. Orku-nýtsla 0,65 kWh. 3.555,-

300 ltr. / 282 ltr. netto. L:104 D: 65 H:87. Orku-nýtsla 0,85 kWh. 3.695,-

400 ltr. / 372 ltr. netto. L:130. Orku-nýtsla: 1,06 kWh. 4.295,-

FØROYA STØRSTU LÁGORKUFRYSTIBOKSIR:

500 ltr. / 452 ltr. netto. L:153. Orku-nýtsla: 1,40 kWh. 4.995,-

600 ltr. / 532 ltr. netto. L:177. Orku-nýtsla: 1,90kWh. 5.895,-

Køksmiðstøðin

á Hálsi - Tlf. 14949

# Fløkjaslig partabrævasøla

**Pf. Faroe Seafood, sum eigur um helvtina av partapeninhinum í Pf. Fiskaídnaði, mótmælti harðliga framferðini, tá ein fjórðingur av Pf. Havsbrún varð seldur í summar.**

BEATE L. JENSEN



Á aðalfundi í Pf. Fiskaídnaði herfyri fór stórur partur av gomlu nevndini frá.

Úr nevndini fóru Bjarti Mohr, nevndarformaður, Jørgen Hansen, Ernst Hansen og Debes Christiansen. Í nevndini eru nú: Niels J. Nielsen, Gudmund Mortensen, Hans A. Dam, Jákup Mørkøre, Johan Páll Joensen, Sigurð Simonsen og Poul Hansen.

Fýra teir seinast nevndu eru nývaldir.

Aðalfundurin í Pf. Fiskaídnaði fyrr í vikuni var fyri árið 1993.

Eingin støða varð á aðalfundinum tikin til eina partabrævasølu, sum fór fram fyrr í ár, tá 25 pst. av partabrøvunum í Pf. Havsbrún varð seldur danska felagnum Aller Mølle, ið er eitt fóðurfelag. Restina av partapeninginum í Pf. Havsbrún eigur Pf. Fiskaídnaður.

Nevndin greiddi annars frá gongdini í málinum, sum fór fram í summar.

## Fóru ov bíliga

Tað var Pf. Føroya Banki, sum áttið tann partin av partapeninginum í Pf. Havbrún, sum danska fóðurfyritøkan keypti.

Sum innan so mong onnur øki í hesum døgum, er eisini hetta mál sera fløkjasligt hjá øðrum at hitta útav.

Men søgan er hon, at Pf. Faroe Seafood eigur um helvtina av partapeninginum í Pf. Fiskaídnaði.

Pf. Faroe Seafood var harðliga ímóti hesi sølu, tí fyritøkan var av tí áskoðan at partabrøvini í Pf. Havsbrún vóru seld fyri ein alt ov lítlan penga.

Nevndin í Pf. Faroe Seafood hevur tí avgjørt at fara víðari við málinum og arbeiðir í løtuni við at stevna Pf. Fiskaídnaði fyri søluna.

Viðmerkingar

# Eitt lítið hugskot til oljuvinnuna!

Tað er eyðvitað, at allir føroyingar gleða seg til, at oljuvinnan fer at kasta av sær, tí er umráðandi at grípa sakina rætt an.

Ein tanki er tann, at tá ið markið millum England og Føroyar er greitt, og loyvið er givið til, at boripallar ella boriskip eru byrjað at bora inni á okkara sjóøki, og oljan er byrjað at renna, so skal oljuvinnan hoyra undir Vaktar- & Bjargingartænastuni.

Soleiðis at okkara vaktarskip, saman við donsku sjóverjuni, fara umborð á boripallarnar minst einaferð um vikuna ella mánaðin, og uppá tann mátan fylgja við, hvussu nógv olja veruliga kemur upp undan okkara havbotni.

So skulu vaktarskipini uppgeva mongdina til Føroya Landsstýri, og síðani avrokna við oljufeløgini eftir galdandi dagsprísum.

Eitt annað, sum kemur at gera seg galdandi, er tað, hvaðani skulu tey føroysku oljufeløg, tað veri seg Statoil, Shell ella BP, frameftir keypa oljuna, skulu tey framvegis keypa olju frá grannalondum okkara?

Ella skulu tey keypa føroyska olju? Um føroysk feløg skulu keypa føroyska olju, so mugu vit hava eitt reinsiverk, og tað hevði møguleiki verið fyri uppi á Sundi; nóg mikið av kaiannleggi.

Fyrst mugu vit kanna í okkara grannalondum, hvussu nógv eitt reinsiverk dálkar (svansar) av sær; um tað er í lagi, so er tað uppá tíðina at byrja uppá reinsiverkið.

Tað má bara ikki henda, at feløg ella nakrir mans fara við øllum vinninginum, men alt Føroya fólk!!!

**Poul Johs. Johansen,**
Tróndargøta 1

# Tillukku við barninum



*Hvønn leygardag ynskir Dimmalætting foreldrum tillukku við lítla barninum, annaðhvørt bara í teksti ella í teksti og myndum. Hetta gera foreldrini sjálvi av. Merk brævbjálvan "Tillukku við barninum", skriva navn og adressu, so vit kunnu senda myndina aftur sum skjótast. Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd í blaðið. Vit skulu hava myndirnar í seinasta lagi friggjamorgun. Um foreldrini ynskja tað, kann myndafólk frá blaðnum taka myndina ókeypis. Ring 11212, og vit avtala nærri.*

# Føroyski dansurin byrjaður aftur í Haldórsvík



Seinasta vetur eftir nýggjár fóru menn undir tiltak við føroyskum dansi í Avhaldshúsinum í Haldórsvík. Dansað varð mánakvøld, soleiðis at smábørnini byrjaðu kl. 19.00, meira tilkomin komu kl. 20.00, og so varð dansað fram móti kl. 22.00.

Hendan royndin at birta upp undir dansin av nýggjum í Vík, har dansurin altíð hevur verið tiltikin, eydnaðist sera væl. Undirtøkan var góð, og tað gleðiliga var, at børn eisini úr Hvalvík, Hósvík, Kollafirði, ja, tað eina kvøldið eisini úr Funningi vitjaðu til bygdina saman við góðum dansifólk, sum arbeiða við barnadansi í heimbygdini. Stuttligt var tað, at Herluf Berthelsen, sum helst meira enn nakar í nýggjaru tíð hevur gjørt vart við tað ríkidømi, vit eiga í kvæðunum og dansinum, eisini var við í dansinum og lærdi ungdómin har norðuri dansispøl, sum hann er so serkønur í.

Seinasta mánakvøld varð lagt fyri aftur, so at hetta mentunarliga menningararbeiði kann vera við til at seta sín góða dám á samveru millum ung og tilkomin, nú dansitíðin er við at taka seg upp frá jóltíðum og fram til føstulávint.

Dansað verður somu tíðir sum í fjør, og teir, sum skipa fyri, gera vart við, at tað er so umráðandi, at foreldur ella onnur vaksin koma at dansa við smábørnunum millum kl. 7 og 8.

Investér 100 kr. og bliv MILLIONÆR!

Ved køb af Statens præmieobligationer deltager De i 21 trækninger om året, (det er en trækning næsten hver 14. dag!) Der er 75.959 kontante præmier, med ialt 85 millioner kroner i gevinster om året. Obligationerne er sikker investering, som De senere kan sælge til Deres bank.

De betaler straks 100 kr. og herefter 100 kr. om måneden i 47 måneder. Efter 47 måneder spiller De gratis med på 11 forskellige præmieobligationer, een af hver type. Straks når De har betalt 100 kr., deltager De i alle trækninger. Har De vundet, får De automatisk besked. Skynd Dem – næste gang er det måske Dem, der er millionær og kan gøre alle drømmene til virkelighed.

Klip kuponen ud – send den i dag.

Husk! Næste trækning er allerede om ca. 14 dage.

Jørn Pedersen A/S

Ørnevej 1 · DK-8766 Nr. Snede · Tlf. 75 77 15 77

VÆRDIKUPON

Send pr. efterkrav (100 kr. + porto) købsbevis med mine 11 numre på obligationer. Rest betaler jeg med 100 kr. pr. måned i 47 måneder. (Spar porto, send check på 100 kr.)

Send mig ______ sæt præmieobligationer.

Navn: ______

Adr.: ______

Tlf.: ______

Sendes til Jørn Pedersen A/S, Ørnevej 1, DK-8766 Nr. Snede, eller ring på tlf. 75 77 15 77 el. 75 77 12 26 og bestil nu.